# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Púra javnt í oddinum

**AB, 07 Vestur og VB/Sumba eru ájøvn í stigum í oddanum av næstbestu deildini. Vágamenn taptu óvæntað í Leirvík, og við sigrinum í Runavík eru argjamenn nú fremstir**

1. DEILD
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Rói Danielsen gjørdi sigursmálið í Runavík í seinastu løtuni, og sendi AB á oddasessin í næstbestu deildini*

Tað er púra javnt í oddanum av næstbestu deildini. AB, 07 Vestur og VB/Sumba hava øll 37 stig, nú 16. umfør varð avgreitt í gjár. Hesi liðini fáa lítla kapping frá teimum seks eykaliðunum í deildini, og tað kann væntast, at TB kann fáa avgerandi leiklut í oddastríðnum.

Leikdagurin í gjár var tó aftur dømi um, at næstbestu liðini kunnu hóttu tey stóru í deildini. AB vann við bit og slit í Runavík, meðan 07 Vestur noyddust stigaleysir heim úr Leirvík.

## AB bjóðar av

Argjamenn hava seinastu vikurnar otað seg nærri oddanum, og í gjár var seinasta takið tikið fyri at røkka ovasta tindinum. Við sigursmálið í seinastu løtu tryggaði AB sær øll stigini, tá teir vitjaðu hjá teimum næstbestu í Runavík. Tað var somuleiðis fimtu ferð upp í slag, at niðurflytararnir fingu fult.

Allan Mørkøre, venjari, hevur fyrr á árinum skýrt unga Trónd Sigurðsson at vera ein hin vandamiklasti framherjin í føroyskum fótbólti. Tað prógvaði Sigurðsson, sum hevur sín upprunað í HB, aftur í gjár. NSÍ var á odda, tá tveir minuttir restaðu av dystinum. Við sínum seinna máli í dystinum fekk hann javnvág í, áðrenn Rói Danielsen stútaði sigursmálið í tíðini, sum dómarin hevði lagt aftrat. Málini hjá NSÍ stóðu Klæmint A. Olsen og Dejan Stoikovic fyri.

Skráin hjá AB í seinastu hevur ljóða á trý eykalið. Komandi vikurnar bíða næstbestu liðini hjá B68, KÍ og EB/Streymi, og tað er krav hjá argjamonnum, at teir fáa fult í øllum dystunum.

## Taptu óvæntað

07 Vestur vann sær tíðliga á kappingarárinum pláss millum fremstu liðini. Men frálíka gongdin, har liðið var ósigrað í seinastu átta dystunum, fekk ein óvæntaðan enda í gjár. Vágamenn fingu einki við sær úr Leirvík.

Uppflytararnir úr Víkingi hava higartil staðið seg best av eykaliðunum í næstbestu deildini. Gestirnir vóru tí væl vitandi um, at talan ikki gjørdist um lætta uppgávu. Per Jacobsen fekk eftir hálvum tíma skumpað bóltin í seinasta pettið um málstrikuna. Løtu seinni stútaði miðvallarin Gunnar Haraldsen hjá vágamonnum í málið eftir hornaspark. Sigursmálið kom í fyrsta minuttinum eftir hvíldina, tá Bárður Hansen var ótrýstur í brotsteiginum, tá hann sendi framvið málverjanum. 07 Vestur royndi at trýsta seinastu løtuna, men uttan at gera stórvegis burturúr.

## Javnt í Gundadali

B68 stríðist í løtuni fyri sætinum í bæði besta og næstbestu deildini. Súni Fríði Barbá er venjari hjá eykaliðnum, og málrevurin tryggjaði sínum monnum eitt stig í Gundadali í gjár. Veteranurin og leikandi venjarin stóð fyri útjavnandi málinum ímóti HB, sum varð skotið í seinna hálvleiki.

Heimaliðið var á odda í hálvleikinum við máli, sum unglingaspælarin Torkil Kollsker skoraði.

Bæði HB og B68 hava sera torførar uppgávur um vikuskiftið. Teir reyðu og svørtu vitja í Vágunum, har 07 Vestur tekur ímóti, meðan toftamenn vitja á Argjum.

## Málleyst

EB/Streymur hevur lagt rygg til fleiri stórtap í hesum kappingarárinum. Liðið er eisini botnproppur í deildini, og ein sigur hevði verið kærkomin, tá teir í gjár vitjaðu KÍ, sum liggur á áttanda plássinum. Hóast bæði liðini høvdu møguleika at avgera dystin, so kom einki mál í Klaksvík.

## Úrslit í 1. Deild

**NSÍ – AB 2-3 (0-1)**
**0-1**: Tróndur Sigurðsson
**1-1**: Klæmint A. Olsen
**2-1**: Dejan Stoikovic
**2-2**: Tróndur Sigurðsson
**2-3**: Rói Danielsen

**Víkingur – 07 Vestur 2-1 (1-1**
**1-0**: Per Jacobsen
**1-1**: Gunnar Haraldsen
**2-1**: Bárður Hansen

**HB – B68 1-1 (1-0)**
**1-0**: Torkil Kollsker
**1-1**: Súni Fríði Barbá

**KÍ – EB/Streymur 0-0**

VB/Sumba og TB spældu fimta dystin undan summarsteðginum.
Tann dystin vann VB/Sumba við 1-0.

## Formula-deildin

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 15 | 10 | - | 2 | - | 3 | 30 | 17 | 13 | 32 |
| 2 NSÍ | 15 | 8 | - | 3 | - | 4 | 23 | 17 | 6 | 27 |
| 3 HB | 15 | 7 | - | 4 | - | 4 | 29 | 12 | 17 | 25 |
| 4 Víkingur | 15 | 7 | - | 3 | - | 5 | 25 | 17 | 8 | 24 |
| 5 B36 | 15 | 6 | - | 6 | - | 3 | 18 | 12 | 6 | 24 |
| 6 ÍF | 15 | 6 | - | 2 | - | 7 | 19 | 25 | -6 | 20 |
| 7 KÍ | 15 | 4 | - | 5 | - | 6 | 18 | 23 | -5 | 17 |
| 8 B71 | 15 | 4 | - | 2 | - | 9 | 17 | 26 | -9 | 14 |
| 9 B68 | 15 | 4 | - | 2 | - | 9 | 9 | 27 | -18 | 14 |
| 10 Skála | 15 | 2 | - | 5 | - | 8 | 11 | 23 | -12 | 11 |

## 1. deild

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AB | 16 | 12 | - | 1 | - | 3 | 61 | 20 | 41 | 37 |
| 2 07 Vestur | 16 | 12 | - | 1 | - | 3 | 64 | 24 | 40 | 37 |
| 3 VB/S | 16 | 12 | - | 1 | - | 3 | 40 | 15 | 25 | 37 |
| 4 TB | 16 | 9 | - | 2 | - | 5 | 43 | 15 | 28 | 29 |
| 5 Víkingur | 16 | 6 | - | 3 | - | 7 | 22 | 40 | -18 | 21 |
| 6 HB | 15 | 4 | - | 5 | - | 6 | 21 | 23 | -2 | 17 |
| 7 KÍ | 16 | 4 | - | 2 | - | 9 | 19 | 47 | -28 | 14 |
| 8 NSÍ | 15 | 3 | - | 4 | - | 8 | 30 | 43 | -13 | 13 |
| 9 B68 | 16 | 3 | - | 2 | - | 11 | 21 | 44 | -23 | 11 |
| 10 EB/S | 16 | 3 | - | 1 | - | 12 | 13 | 62 | -49 | 10 |

## Komandi umfar, leygardagin 9. august

AB – B68
KÍ – TB
07 Vestur – HB
Víkingur – NSÍ
EB/Streymur – VB/Sumba